Norðurlandakøka

Til ein føðingardag hoyrir vanliga ein lagkøka. Tá Norðurlandahúsið fylti 20 ár, var einki undantak. Ein stór lagkøka, ið var eitt modell av Norðurlandahúsinum, stóð á borðinum

NORÐURLANDAHÚSIÐ

Magnus Gunnarsson

Í Norðurlandahúsinum arbeiða kreativ fólk, tað sóu vit best hósdagin. Í hesum førinum vóru tað tær báðar, Katrin Johannesen og Judith Ludvig, ið høvdu gjørt eina køku, ið var eitt modell av Norðurlandahúsinum. Tær greiddu okkum frá, at køkan var uppbygd av lagkøkubotnum, makrónum, køkukremi, syltitoy og marcipan við pistacie-massa. Báðar hava tær útbúgving innan matgerð, Katrin Johannesen er útbúgvin kondittari og Judith Ludvig er útbúgvin kafeteria-assistentur og matstovuatstøðingur. Katrin og Judith arbeiða báðar í køkinum. Judith er eisini leiðari á kafeteria í húsinum.

Katrin Johannesen og Judith Ludvig gjørdu køkuna

Tey fýra systkini á Argjum…

RÆTTLEIÐING

Tá vit í blaðnum í gjár umrøddu Sverra Mortensen og hini børnini hjá Mortan og Rakul Mortensen á Argjum í greinini um Argjar, sum fyltu 175 ár, kom ein misskiljing í:

Vit skrivaðu, at systkini hjá Sverra vóru 12 í tali, og at trý teirra vóru eftir á lívi. Her skuldi standa, at trý teirra vóru eftir á Argjum.

Tey eru fýra, sum eru eftir á lívi. Sverri Mortensen, Jóhannes Mortensen og Maja Dalsgarð á Argjum og systirin Dus Kjærgaard býr í Danmark.

Tey eru oldurabbabørn Andrass Mortansson, sum 9. mai í 1828 keypti ognarnir hjá Argjahospitalinum og bygdi Argir.

blaðm.

Hátrýstvaskarin!

Ring 42 31 11

Útbjóðing

Farmaavgreiðsla í Nólsoy

Strandfaraskip Landsins fara við hesum at bjóða út rekstraruppgávuna av farmaavgreiðsluni í Nólsoy.

Uppgávurnar hjá farmaflutningsdeildini
Farmaflutningsdeildin skal veita leiðslúni eina úrslitagóða fyrisiting innan farmaflutning, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina innan farmaflutning.

Uppgávurnar hjá avgreiðsluni
Uppgávurnar hjá avgreiðsluni í Nólsoy, sum er undir farmaflutningsdeildini, eru:
- Farmaavgreiðsla
- Skipaavgreiðsla
- Skriva farmabrev
- Tryggja at samsvar er millum farm og farmabrev
- Farmauppgerð

Førleikakrav
Vit rekna við, at tú, sum skal rokja uppgávurnar, er:
- Fyrikomandi
- Alitandi og rokin

Setanartreytir
Starvið verður sett sum bert avtalu.

Umsókn
Umsókn skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritiknin í hendi í seinasta lagi 12. mai 2003.

Um tú yniskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Heina á Borg, farma-flutningsleiðara, á Tel 343060 ella t-post: *hab@sl.fo*.

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.sl.fo